

# KUNDU SAKTANS LÆKKAÐ SKATTI

**KUNOY** Tað er hugaligt at koyra gjøgnum tær báðar bygdirnar í Kunoyar kommunu. Onkur vildi helst hildið, at hetta vóru tvær bygdir har fólk hvørki støðaðust ella ynsktu at seta búgv. Men so er ikki. – Vit eru faktist tann kommunan sum er vaksin mest seinastu 25 árini, sigur John Damberg, borgarstjóri

Snorri Brend

Í Kunoy eru eitt rættiliga stórt tal av sethúsum bygd tey seinastu árini. Og í Haraldssundi er ikki so øgiliga langt síðani, at fólk fluttu inn í nýggj hús á Leitisvegi. Annars tykist stígur vera komin í:

– Vit hava í øllum førum merkt tað til kreppuna, at tað sær út til, at fólk fáa ikki so lætt lán til sethús. Tí er ikki sama ferðin yvir byggingini beint nú sum tað einaferð var, staðfestir John Damberg.

Hann leggur tó aftrat, at grundøki eru tøk í báðum bygdunum. Og gongur tú ein bygdatúr í Kunoy sært tú, at her er grivið út fyri enn einum sethúsum.

– Tey flestu sum flyta higar hava okkurt tilknýti til bygdina. Og tá tey byggja í Kunoy, fáa tey eisini eitt fantastiskt útsýni við í keypinum, sigur hann brosandi.

## Fráflyting

At hamarsløgini gella og ein sær at eini sethús so líðandi fáa skap, skapar sum vera man bjartskygni og trivna í eini bygd.

> **Vóru hesi frambrotini ikki framd júst tá, so vóru bygdirnar minkaðar burtur í einki. Ja, so vóru vit í somu støðu sum t.d. Skúvoy er í idag**

Uppgávan hjá kommununi hevur í hesum sambandi verið at tryggja, at fólk altíð hava kunnað fingið grundøki, um tey vóru áhugað í tí.

Hóast fólkatalið hevur ligið rættiliga støðugt í Kunoyar kommunu tey seinnu árini, merkja tey eisini nakað til fráflytingina til størri pláss ella meginøkið.

– Men hetta fáa vit sum kommuna ikki gjørt so øgiliga nógv við. Uttan kanska líka tað at lækka skattin, sigur John Damberg.

At fólkatalið minkar er sjálvandi ein støða sum neyvan hóvar fólki væl, men sum tykist vera ein trendur kring oyggjarnar.

– Uppliva tey ikki eisini tað sama í Klaksvík?, spyr borgarstjórin í Kunoy. – Tað vísir seg, sum um at tey ungu hava ilt við at støðast á teimum smærru plássunum.

## Lækka skattin

Í dag hevur kommunan eitt skattaprosent uppá 18. Men stóð tað til John Damberg hevði hann ynskt sær eitt munandi lægri skattaprosent.

– Eg haldi sjálvur, at 18 prosent er so ríkiliga høgt, slær hann fast.

John hevði dámað betri, um ein lækkaði skattaprosentið heilt niður í 16, eins og tað var áður. Hann roknaði eitt sindur uppá tað við hansara egnu inntøku sum grundarlag. Og hann kom fram til, at tað var rættiliga nógvar túsund krónur bíligari at búgva í Haraldssundi enn í Klaksvík.

Tað var annars her at tað lá, fram til fyri eini tveimum árum síðani, tá avgerð varð tikin um at hækka tað við heili tveimum prosentum. Gjørdi ein tað sama aftur nú, hevði tað verðið enn ein góð orsøk hjá fólki at búð her ella búsett seg her.

Kommunan er rímiliga væl fyri fíggjarliga, við rættiliga fitt av peningi standandi á bók – tað sum svarar til eina hálva álíkning.

– Og sum fíggjarstøðan er nú, skuldi avgjørt verið møguleiki fyri eini lækking, sigur hann, og vónar at bygdaráðið kann taka hetta málið uppaftur enn einaferð.

– Fólk tíma neyvan at búseta seg í eini kommunu, har tey verða knokkroytt í skatti, staðfestir John Damberg, borgarstjóri.

*snorri@sosialurin.fo*